# Maiken vann ferðaseðlarnar

**SUDOKU-KAPPING**
*Steintóra Joensen*

Hepni vinnarin av sudokukappingini hesaferð og harvið tveimum flogferðaseðlum við Atlantic Airways, var funnin í dag.

Vinnarin gjørdist Maiken Joensen úr Havn.

Hon sigur, at hon og maðurin plaga at loysa saman, og hava tey sent inn til hvørja kapping síðan kappingin byrjaði, fyri gott einum ári síðan.

Tá Maiken verður spurd, um hon hevur umhugsað hvat hon ætlar at brúka ferðaseðlarnar til, sigur hon, at leiðin gongur møguliga niður til Danmarkar, men einki er avgjørt enn.

Vit ynskja Maiken tillukku við vinninginum.



*Maiken Joensen í Havn var hepni vinnarin í Sudokuðkappingini, og vann hon tveir ferðaseðlar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Steintóra Joensen úr Vági, sum er í starvsvenjing á Sosialinum, dróg vinningin í Sudoku-kappingini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av landsynningi og vætakavi, seinni regn. Hitin kemur upp í eini 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing . Ælingur, sum fráliður vátakavi. Hitin um dagin millum 4 og 7 stig – um kvøldið niður móti frostmarkinum.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn, seinnapartin upp í skrið av útsynningi og ælingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men hann minkar vindin út á dagin og yvirhøvur turt. Sunnudagin veksur hann vindin aftur upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -11 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | -1 |
| London | 5 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -2 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 13 |
| Mallorca | 16 |
| Athen | 8 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 957 hPa. í landsynning úr Føroyum fer skjótt í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 988 hPa. í útsynning úr Írlandi fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Skagerrak hvørvur eystureftir. Eitt djúpt lágtrýst í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 2/1 kl. 06[00]– 3/1. 06[00]. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti í gjár: 1,4° - Mesti hiti máldur í januar: -°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 2/1 kl. 06[00]– 3/1 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 3,0 mm


Lesið Sosialin -tað loysir seg

Sosialurin





## VESTFALLSKYRRINDI

3. januar — Fullmáni/Jørðin næst sólini
10. januar — Mánin longst frá jørðini
11. januar — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. Jan | 10.51 | 23.09 | 09.51 | 22.09 | 10.06 | 22.24 | 00.32 | 12.51 | 01.32 | 13.51 | 09.06 | 21.24 | 08.06 | 20.24 | 11.06 | 23.24 | - | 12.06 | 10.36 | 22.54 | 11.51 | - |
| 10. Jan | 11.27 | 23.58 | 10.27 | 22.58 | 10.42 | 23.13 | 01.09 | 13.27 | 02.09 | 14.27 | 09.42 | 22.13 | 08.42 | 21.13 | 11.42 | - | 00.24 | 12.42 | 11.12 | 23.43 | 00.09 | 12.27 |
| 11. Jan | - | 12.29 | 11.29 | - | 11.44 | - | 01.58 | 14.29 | 02.58 | 15.29 | 10.44 | 23.15 | 09.44 | 22.15 | 00.13 | 12.44 | 01.13 | 13.44 | - | 12.14 | 00.58 | 13.29 |
| 12. Jan | 01.00 | 13.32 | 00.00 | 12.32 | 00.15 | 12.47 | 03.00 | 15.32 | 04.00 | 16.32 | 11.47 | - | 10.47 | 23.06 | 01.15 | 13.47 | 02.15 | 14.47 | 00.45 | 13.17 | 02.00 | 14.32 |
| 13. Jan | 01.51 | 14.11 | 00.51 | 13.11 | 01.06 | 13.26 | 03.51 | 16.11 | 04.51 | 17.11 | 00.06 | 12.26 | 11.26 | 23.47 | 02.06 | 14.26 | 03.06 | 15.26 | 01.36 | 13.56 | 02.51 | 15.11 |